Bilar

Nr. 70 • hósdagur • 10. apríl 2003 • 77. árg.

# Ford Tourneo Connect

**Hjá P/F Wenzel hava teir fingið nýggja Ford Tourneo Connect, ið er ein rúmligur 5 persónabilur við stórum viðførisrúmi. Bilurin verur gjørdur á eini Ford verksmiðju í Turkalandi**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*



*Lennard Pedersen, sølumaður hjá P/F Wenzel, við nýggja Ford Tourneo Connect*




*Bilurin hevur dragihurðar í báðum síðum og stórt viðførisrúm*

Ford Tourneo Connect verður gjørdur saman við Ford Transit Connect, ið er vøruvognsútgávan av sama bili. Persónbilurin Tourneo Connect er ein rúmligur 5 persónabilur við stórum viðførisrúmi. 1.8 litur TDCi dieselmotorurin hevur 90 hk. Bilurin fæst eisini viðbensinmotori. FDM hava royndarkoyrt bilin, og lata teir væl at koyrieginleikunum og bilunum annars. Sum í øllum nýggjum MPV-bilum er nokk av hyllum og skuffum til at leggja lutir frá sær. Eisini upp eftir er nokk av plássi. Um baksetrið verður tikið út, er Tourneo Connect sum ein vørubiliur. Bilurin hevur dragihurðar á báðum síðum. Tourneo Connect kann síggjast og roynast hjá P/F Wenzel.

# Ford Ranger Super Cab 4x4



*Jógvan Højgaard, sølumaður hjá P/F Wenzel, við Ford Ranger Cuper Cab 4x4*

**Í vikuni kom ein nýggjur Ford Ranger til landið. Ranger er umleið sami bilur sum Mazda B 2500. Bilurin verður gjørdur sum 4x4 í útgávunum: Super Cab, Double Cab og XLT Double Cab**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*


*Við ongum mittarstlólpa er bilurin sera brúkaravinarligur, og lætt er at koma inn aftan fyri forsetrið*

Ford Ranger er ein væl egnaður arbeiðsbilur, sum fæst í ymiskum útgávum. Síðuhurðarnar kunnu latast upp uppá tveir ymiskar mátar, t.v.s. at tær eru hongdar framman, sum vanligt, ella at ongin mittarstólpi er millum hurðarnar. Við ongum mittarstlólpa er bilurin sera brúkaravinarligur, og lætt er at koma inn aftan fyri forsetrið. Allar útgávurnar sama motor, ein 2,5 litur 4 syl. turbodiesel við intercoolara og 109 hk.



### Ford Ranger Super Cab 4x4

| | |
|---|---|
| Motorurin: | 2,5 litur 4 syl. diesel við 109 hk v. turbo og intercoolara |
| Longd: | 501,2 cm |
| Breidd: | 174,0 cm |
| Hædd: | 174,0 cm |
| Aksilfrástøða: | 300,0 cm |
| Prísur: | kr. 174.200 u / mvg<br>kr. 217.000 v / mvg |
| Søluumboð: | P/F Wenzel<br>Akranesgøta 5<br>FO-100 Tórshavn<br>Tel. 354500 |





## Cadillac CTS



General Motors Cadillac-Division byrja at selja Cadillac CTS í Japan nú í vár. Næsta ár verður bilurin eisini seldur í Evropa.
*Kelda: Motor Magasinet*

## Nýtt danskt bilblað




"NYT OM BILER" er navnið á nýggja bilblaðnum, sum Flemming Haslund, fyrrverandi blaðstóri á bløðunum Bil Magasinet og Bilen Motor & Sport, stendur fyri. Blaðið verður gjørt í samstarvi við bilblaðið Autocar í Onglandi.
*Kelda: Motor Magasinet*

## Ford GT40



Ford hava avgjørt, at einans 1500 bilar av Ford GT40 skulu framleiðast. Bilurin er gjørdur við Ford GT40 frá 60-unum sum fyrimynd. Einans 80 bilar koma til Evropa.
*Kelda: Motor Magasinet*


*FDM royndarkoyrdi fimm ymisk bilmerki við ESP og uttan ESP á Jyllands-Ringen*

# ESP – ein góð hjálp hjá bilføraranum

**ABS (Anti Blokering Systems) er standard í øllum nýggjum bilum, men vit síggja at alt fleiri bilar koma við øðum skipanum, eitt nú ESP sum vísir seg at verða ein góð hjálp hjá bilførarunm í eini neyðstøðu**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Har sum ABS bremsuskipanin tryggjar at bilførarin kann stýra og bremsa samstundis, fer ESP (Elektronisk Stabilitets Program) meira nágreiniliga til verka. ESP skipanin er ein elektroniskt stýrd skipan, ið forðar fyri at bilurin glíður út í svingum. Skipanin merkir beinanvegin um síðuføringskreftirnar ikki passa til ferðina á bilinum, og í hvønn rætning bilførarin koyrir. Bilførarar eiga tó at minnast til at hóast skipanir sum t.d. ABS og ESP eru ein sera góð hjálp, so kunnu tær ikki avtaka natúrlógirnar. Hvørki ABS ella ESP skipanirnar eru gjørdar, fyri at bilførarar skulu koyra við meira ferð, enn teir høvdu gjørt uttan hesar intelligentu trygdarskipanir.

### Við ella uttan ESP

FDM hava testa nakrar bilar av sama slagi, við og uttan ESP skipan. Teir royndarkoyrdu bilarnar á Jyllands-Ringen. Tað vísti seg at vera stórur munur. Fyrst royndarkoyrdu teir ein bil við ESP, síðan koyrdu teir sama túrin við somu ferð við einum eins bili, men uttan ESP. Tað víst seg at teir mistu tamarhaldið á bilinum, sum fór út av vegnum í einum svingi. Úrslitið av hesum testunum vísti at ESP er ein góð íløga í trygdina í bilinum. Í Evropa hava 29 prosent av øllum nýggjum bilum ESP.
*Kelda: FDM / Motor*


*Hesin bilurin bleiv so hart koyrdur, at hann fór út av vegnum. Bilurin hevði ikki ESP*


*Her verður ein Fiat Stilo royndarkoyrdur*